## Carsten Kjær Hansen fingið heiðurstekin

Carsten Kjær Hansen, marinuserfrøðingur og telegrafistur hjá Færøernes Kommandi, fekk tann 29. januar heiðurstekin fyri góð tænastu hjá sjóverjuni.

Heiðurstekinið, sum fyrstu ferð varð latið 29. januar í 1901, verður latið fólki hjá Søetatuni ella Orlogsværftininum fyri 25 ára góða tænastu.

Tað var Jesper Dinesen, kommandørur, sum handaði heiðurstekini á samkomu hjá Færøernes Kommando.

# Fartelefonir ongin trupulleiki longur

**Fyri hálvum øðrum ári síðani vóru fartelefonir ein stórur trupulleiki í skúlanum við Ósánna, men hesin trupulleiki er so gott sum ósjónligur í dag, sigur Rannvá Joensen, varaskúlastjóri í skúlanum við Ósánna.**

FARTELEFONIR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað byrjaði í skúlaárinum 2000/01. Fleiri og fleiri næmingar, serliga í framhaldsdeildini, høvdu fartelefon. Nýtslan var í ein stóran mun bert í fríkorterunum, men lærararnir høvdu ilt við at fáa næmingarnar at leggja telefonirnar til síðis. Tað kom ofta fyri, at tað fór ov nógv tíð og orka til at rudda fartelefonir vekk, ístaðin fyri at byrja við undirvísingini beinanvegin.

Men tað var ein annar trupulleiki, sum eisini hevði hug at stinga seg upp. Næmingarnir sótu og sms-aðu sínámillum um onnur í flokkinum. Summi bóru ótta fyri at hetta kundi fara at enda við eitt slag av happing, sum man hevur arbeitt sera nógv við at fáa út úr skúlunum. Tað er eisini sera a-sosialt, at tað sita fleiri næmingar saman, men tosa ikki, tí tey eru so upptikin av eini fartelefon.

- Eg sigi ikki, at tey ikki skulu hava fartelefon, men tað er heldur ein spurningur um rætta nýtslu. Og í skúlatíðini er so onki at nýta fartelefon til, sigur Rannvá Joensen.

### SMS frítt

Ein av høvuðsorsøkunum til, at trupulleikin gjørdist so stórur, er helst, at tað kostaði onki at senda SMS boð inntil fyrst í desembur 2000. Tá næmingarnir vóru noyddir at rinda fyri nýtsluna, sást ein minking. Men fleiri næmingar í framhaldsdeildini hava arbeiði, so tey fíggja teirra nýtslu sjálvi. Hjá teimum yngru er tað aloftast foreldrini, sum gjalda.

### Viðgjørdu trupulleikan

Lærararnir samdust um, at taka trupulleikan upp á einum lærararáðsfundi beinanvegin, áðrenn tað vant upp á seg. Tað bleiv gjørt eitt skriv, sum varð sent heim til foreldrini. Í hesum brævi stóð, at nýtsla av fartelefon er ikki loyvd í skúlatíðini. Bleiv hetta ikki yvirhildið, so varð telefonin tikin frá næminginum, og foreldrini biðin um at avheinta hana. Hetta varð gjørt í samstarvi við skúlanevndina. Breið semja var um, at fartelefon ikki er neyðug, í meðan børnini eru í skúla. Korttelefon er á gongini, umframt at tað kann ringjast frá og til skrivstovuna. Næmingarnir vóru ikki glaðir um hetta í fyrstuni, men tey góðtaka tað nú.

### Fartelefonin komin fyri at verða

Tað vóru ikki so mong, sum høvdu telefon í byrjanini, men tað vant sera skjótt upp á seg. Í dag hava okkurt um 80 prosent av næmingunum í einum flokki telefon. Tað eru eisini yngri børn, sum hava telefon nú. Heilt niður í 2. flokk. Rannvá heldur, at fartelefonin er komin fyri at verða. Hetta er eitt tøkniligt framstig og eitt amboð, sum er sera hent at hava, men spurningurin er hvar og nær hóskar tað seg – ikki í skúlanum.



*Tað var eitt ávíst trýst á teimum, sum ikki høvdu fartelefon. Tey kendu seg uttanfyri.*

# Næmingar í Skúlanum við Ósánna um fartelefonir

**Vit hava tosað við nakrar næmingar á Skúlanum við Ósánna um fartelefonir.**

FARTELEFONIR

**Alvin E. Andersen, 9.b**



- Eg havi havt fartelefon í umleið eitt ár, eg fekk hana í føðingardagsgávu frá mammu og babba. Eg havi Teletíð og brúki umleið 400 krónur um mánaðin, foreldrini gjalda.

- Eg havi hana, sum oftast, við í skúla, men brúki hana bara í fríkorterinum. Eg ringi ikki so nógv, men skrivi heldur sms. Haldi annars ikki, at tað er so farligt, um ein ikki sleppur at brúka fartelefon í skúlatíðini.

**Henrietta Arge Poulsen, 7.a**



- Eg havi havt mína fartelefon í eitt hálvt ár, havi allatíðina havt Teletíð. Eg brúki umleið 300 krónur um mánaðin, og mamma og babba gjalda eitt sindur og eg rest.

- Eg havi hana við í skúla, men brúki hana næstan ongantíð. Eg haldi, at tað er í lagi, at tað ikki er loyvt at brúka fartelefon í skúlatíðini.

**Anna Hvidbro, 9.a**



- Eg fekk mína fartelefon, fyri hálvum øðrum ári síðani, frá babba. Eg havi Teletíð og brúki um 500 krónur um mánaðin, sum eg gjaldi sjálv.

- Eg haldi, vit kundu brúkt telefonina í fríkorterinum. Men hon órógvar í tímunum.

**Hanna Steinberg, 5.b**



- Eg fekk mína fartelefon í jólagávu frá mammu og babba. Eg havi Teletíð og brúki umleið 100 krónur um mánaðin. Eg sendi sum oftast sms, men tá eg ringi, biðji eg mammu ringja aftur.

- Eg havi hana við í skúla, men hon liggur bara í taskuni, tí eg havi ikki brúk fyri henni.

**Heidi Isaksen, 10.a**



- Eg keypti mína fartelefon fyri tveimum árum síðani. Eg arbeiði aftaná skúlatíð, so eg gjaldi sjálv tær 300 krónurnar, eg brúki.

- Eg haldi, tað er í lagi, at vit ikki sleppa at brúka telefonina í skúlatíðini. Eftir eina tíð, hildu vit sjálvi, at tað var troyttandi, at onnur vóru upptikin av telefonini í heilum.

**Jógvan Hansen 10.b**



- Fyri einum ári síðani fekk eg mína telefon frá mammu og babba. Eg plagi at landa á Kósini, so eg gjaldi sjálvur tær 300 krónurnar, sum eg brúki.

Eg havi telefonina við í skúla, men tá sendi eg bara sms. Mest til konufólk...

- Eg haldi, tað er í lagi, at vit ikki sleppa at brúka telefonina í skúlatíðini.



# Tórun fylgir Peter Brixtofte

**Síðani oktober mánað síðsta ár hevur Tórun Ellingsgaard fylgt tí nógv umtalaða Peter Brixtofte, borgarstjóri í Farum, sum hevur verið nógv frammi í donskum fjølmiðlum, har hann verður ákærdur fyri at hava oysla við skattapengunum upp á fínar døgurðar og annað. Nýggja gølan kemur ikki heilt óvart á Tórun**

GØLA
*Heri á Rógvi*

Tað er sambandi við, at Tórun ger sína høvuðsuppgávu á Danmarks Journalist Højskole (DJH), at hon hevur fylgt Peter Brixtofte síðani oktober mánað 2001. Tað síðsta árið á DJH skulu næmingarnar gera eina høvuðsuppgávu. Hendan kann gerast í ymsum formum, t.e. millum annað skrivligt (greinir v.m.) og í livandi myndum (sending v.m.)

Tórun Ellingsgaard valdi at gera sína høvuðsuppgávu um Peter Brixtofte.

– Eg var í starvsvenjing hjá TV2 Lorry, sum er lokal rásin hjá TV2 fyri Eystursæland. Meðan eg var í starvsvenjing var Peter Brixtofte oftani frammi. Hann var serliga kendur fyri at stuðla Farum Boldklub sera væl, og so sendi jú eisini pensjónistarnar í kommuni suðureftir einaferð um árið. Eg og ein donsk genta hildu hetta vera eitt spennandi evni, so vit settu í okkum í samband við Peter Brixtofte, og hann var lættur at yvirtala, sigur Tórun Ellingsgaard.

Tá vit fangaðu Tórun í telefonini hósmorgunin, hevði hon ein avtalu við Peter Brixtofte sama morgun viðvíkjandi einari samrøðu, men hetta mátti avlýsa, tí Peter Brixtofte hevur nógv um at vera hesar dagarnar.

Gølan um Peter Brixtofte hevur stungið seg upp í sambandi við, at danska blaðið BT hevur funnið fram til, at hann hevur etið góðan mat og ikki minst drukkið nógv gott vín fyri nógvar túsund krónur, og rokningin er sent kommununi og harvið eisini skattgjaldarunum. Tað er harafturat komið fram, at Peter Brixtofte hevur kallað tær stóru rokningarnar fyri fundarútreiðslur, og hetta hevur nú vakt rættiliga nógvan ans.

### 3 mánaðar og 70 fólk

Uppgáva hjá Tórun og hennara starvsfelaga gongur út upp á at skriva tveir kapitlar í einari ævisøga um Peter Brixtofte. Tann fyrri av hesum snýr seg um tíðina tá foreldrini hjá Peter Brixtofte hittust. Hin kapittulin kann lýsast sum tann síðsti kapittulin í ævisøguni higartil, har tað nógva rokið við fótbóltsfelagnum og viðurskiftunum hjá honum.. Tær báðar kanna í løtuni møguleikarnar at geva verkið út í bók.

– Síðani oktober mánað hava vit fylgt honum rættiliga tætt. Vit hava havt einar fimm samrøður við hann sjálvan, men vit hava tosað við eini sjeyti kenningar hjá honum, og hetta ger, at vit eru komnar at kenna rættiliga nógv til persónin Peter Brixtofte, sigur Tórun Ellingsgaard.

Nú Tórun hevur arbeitt so mikið við nógv við Peter Brixtofte, so er hon eisini komin at kenna eitt sindur um hann, og tað kom ikki serliga óvart á hana, at henda gølan kom fram.

– At tað júst var hetta, ið kom fram, kom kanska eitt sindur óvart á meg, men heilt yvirraska eri eg ikki. Vit hava fleiri ferðir vita, at ein forsíða kundi verið á veg, men vit skulu bíða við at koma fram við okkara, sigur Tórun Ellingsgaard.

Í løtuni hevur trupult við at fáa samband við Peter Brixtofte, tí so nógv rok er rundanum hann.

Annars hevur tað skoðsmál at geva Peter Brixtofte, at hann er ein ógvuliga intelligentur og professionellur maður, sum dugur væl at snúgva sær.

– Hann hevur øgiliga nógv makt í Farum. Hann letur eitt nú ikki Tilsynsrådet koma inn at kanna hansara viðurskifti, og hetta hevur eisini skapt eitt sindur av rokið. Men hann og flokkur hansara Venstre eru ógvuliga væl umtókt í Farum. Í løtuni hava teir 11 av teimum 19 umboðunum í býráðnum, sigur Tórun Ellingsgaard, sum er í holt við at skriva uppgávuna í løtuni.

### Farum

Peter Brixtofte er í løtuni borgarstjóri í Farum Kommune, sum liggur á Sælandi í útjaðaranum av Keypmannahavn. Tað búgva umleiðs 19.000 fólk í kommuni Hann er limur í Venstre, og hann situr á eisini á fólkatingi. Hann var leingi mettur at vera ein av krúnprinsunum í Venstre, og hann á eisini framvið at gerast formaður, men hetta var av ongum.

Nú er hann kendur sum tann sterki maðurin í Farum Kommune, har hann hevur uppfunnið tað sokallaða Farum-modellið. Hann stiðjar fótbóltsfelagnum í býnum, Farum Boldklub ógvuliga væl, og kommunan og Brixtofte eiga æruna fyri, at felagið er so mikið frammarliga sum tað er.

Peter Brixtofte hevur selt nógvar av ognunum hjá Farum Kommune til eitt partafelag. Kommunan leigar so hesar ognirnar frá felagnum aftur.

Peter Brixtofte er ein ógvuliga væl umtóktur borgarstjóri í Farum. Hansara persónliga atkvøðutal liggur um 5.000, og hetta er ikki so lítið, tá hugsað verður um, at býurin hevur um sama íbúgvaratal sum Tórshavn.

Sum heild hevur Farum verið kend fyri at vera ein góð og væl drivin kommuna, men hetta er tað óivað nógvar meiningar um.



*Tórun Ellingsgaard hevur starvast í SvF, og hon hevur harafturat roynt seg á MTV og í TV2. Í løtuni er hon í holt við sína høvuðsuppgáva á DJH. Uppgávan snýr seg um tann nógv umstrídda Peter Brixtofte, sum ovast á plaktini í donskum fjølmiðlum í løtuni*

*mynd: Jens Kristian Vang*



*Peter Brixtofte, borgarstjóri í Farum Kommune og fólkatingslimur fyri Venstre, siglir í løtuni á rættiliga stórum aldum. Rokið um tær stóru marglætisrokningarnar er nú komið so langt, at hann er farin í farloyvi*

**Verkfrøðingur**
**til Pf. Vágatunnilin**

**Søkt verður eftir verkfrøðingi til projekterings- og byggileiðslu og aðrar uppgávur, millum annað í sambandi við Norðoyatunnilin.**

**Førleikakrøv**
Tann rætti umsøkjarin
- er verkfrøðingur ella hevur líknandi útbúgving frá hægri lærustovni
- hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá projekterings- og byggileiðslu
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt mál

**Lønar og setanartreytir**
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. apríl 2002, ella eftir nærri avtalu. Løn og setanartreytir annars eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350200 ella teldupost drh@vagatunnilin.fo



Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. februar 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu sendast til:

Vágatunnilin p/f
Postboks 1010
110 Tórshavn

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.vagatunnilin.fo